VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL

Nr. 179 • mikudagur • 21. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo



*Randi Vang, ið er millum høvuðsfyrireikararnar av Gluggaglæmu, heldur, at eitt nýtt ættarlið er á veg innan føroyska handverkslist. Hon letur annars stak væl at undirtøkuni fyri framsýningini.*

*Mynd: Jan Müller*

# Nýtt ættarlið innan handverkslist

**Okkurt um 2500 fólk vitjaðu framsýningina hjá Gluggaglæmu, og sambært fyrireikarunum ber til at staðfesta, at eitt nýtt ættarlið ger vart við seg innan føroyska handverkslist**

GLUGGAGLÆMA
*Terji Nielsen*

Ein av høvuðsfyrireikarunum av Gluggaglæmu, Randi Vang, sigur, at hóast vitjunartalið í ár er nakað væl lægri enn í fjør, so eru tey stak væl nøgd við undirtøkuna.

- Í fjør høvdu vit jú sjalkappingina sum ein part av sjálvari framsýningini, og tað hevur ivaleyst drigið nógv fólk, soleiðis at vitjunartalið í fjør var óvanliga høgt. Eg vænti tí, at talið í ár er meiri veruligt, sigur Randi Vang.



*Ikki færri enn 40 framsýnarar tóku lut á Gluggaglæmu í ár, og sum heild kann sigast, at talan er um eina góða vøru, sum er bæði gott handverk og gott snið, sigur Randi Vang.*

*Mynd: Jan Müller*

## Fleiri og fleiri við útbúgving

Randi Vang sigur, at tað fyri hvørt ár eru fleiri og fleiri nýggir ungir føroyskir sniðgevar ella skraddarar, sum taka lut á Gluggaglæmu.

- Talan er um eitt heilt nýtt ættarlið av føroyskum handverkslistafólkum, og tey flestu av teimum hava eina útbúgving á økinum. Hesi hava nomið sær útbúgving annaðhvørt í Danmark ella Bretlandi, og tey eru við til at geva nýggjar impulsir. Oftani eru hesi eitt sindur djarvari enn fleiri av teimum gomlu, og tey tora betur at seta tingini saman, greiðir Randi Vang frá.

Sambært Randi Vang vísti Gluggaglæma í ár, at føroysk handverkslistafólk hava eina góða vøru, sum er bæði gott handverk og gott snið. Eini 40 framsýnarar tóku lut í Gluggaglæmu í ár.

## Vilja hava føroyska handverkslist fram uttanlands

Í dag verður skipað fyri stórari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum undir heitinum "Snið og handverk í heimligum og altjóða høpi", og fleiri enn 120 fólk hava boðað frá luttøku.

Á ráðstevnuni fer millum annað Michael Lange, stjóri í Erhvervscenter for erhverv, vækst og udvikling í Keypmannahavn, at greiða frá um kreativar íbirtarar í Keypmannahavn. Randi Vang sigur, at høvuðsendamálið við ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum er at birta lív í eitt kjak her heima um, hvat vit vilja við føroyskari handverkslist, og hvussu vit kunnu fáa hana longur fram í ljósið uttanlands.

Umframt fyrilesturin hjá danska erhvervsstjóranum eru fleiri aðrir fyrilestrar á skránni. Eitt nú fer Maggie Marr, ið er leiðari á sniðgevaraútbúgvinigini á Shetland College, at greiða frá hesari útbúgving, og vísa á hana sum ein møguleika fyri kreativar føroyingar. Møguleiki verður eisini at hitta Maggie Marr til eitt prát eftir ráðstevnuna.

Stóra finalan á ráðstevnuni í dag verður ein sonevnd Catwalk, har pløgg frá kappingini Upprák verða sýnd fram alment.

# Fjølbroytt vinnustevna

**Síðst í komandi mánað verður Faroexpo 2005 á skránni í Runavík. Talan er um eina altjóða vinnustevnu, har okkurt um 70 fyritøkur úr bæði Føroyum og útheiminum fara at taka lut**

VINNUSTEVNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað er vorðið alsamt meiri vanligt her á landi, at skipað verður fyri ymiskum ráðstevnum, sum hava til endamáls at tæna føroyskum vinnulívi. Í døgunum 25. til 27 oktobur í ár verður stór altjóða vinnustevna í Runavík, sum ber heitið Faroexpo 2005. Á skránni verða bæði eitt sonevnt partneriat, har vinnufyritøkur hittast til prát, og ein røð av áhugaverdum fyrilestrum.

## Leggur upp til samstarv

Tað er Eysturoyar Vinnufelag, ið hevur tikið stig til Faroexpo 2005, og felagið heitti síðani á Sp/F Virkisráðgeving í Saltangará um at skipa fyri stevnuni, og á skrivstovuni hjá Virkisráðgeving hava tey havt úr at geva við at fyrireika stevnuna.

Faroexpo 2005 vendir sær í høvuðsheitinum til føroyskar og útlendskar vinnufyritøkur og feløg, sum fáast við, ella ætla sær í holt við útflutning og møguligt samstarv innan útflutning.

Sum áðurnevnt verður skipað fyri einum sonevndum partneriati í høllini í Runavík, har ein stórur partur av ráðstevnuni verður. Mannagongdin á slíkum partneriatum er tann, at luttakararnir á stevnuni hava fingið sendandi ein lista yvir allar luttakararnar, og síðani hava teir hvør í sínum lagi ynskt at hitt ávísar luttakarar á skipaðum fundum, sum verða hildnir innan fyri eitt avmarkað tíðarskeið á einum stevnubási á Faroexpo 2005.

Hetta verður gjørt, so at fyritøkurnar og feløgini kunnu hittast á ein miðvísan hátt og fáa greiðu á, um partarnir hava felags áhugamál, ið kunnu verða til frama fyri eitt møguligt útflutningssamstarv.

## Statoil ætlar at hitta føroyskar veitarar

Millum útlendsku luttakararnar á altjóðu vinnustevnuni í Runavík verða norsk umboð fyri Statoil. Hesi koma til Føroya við tí fyri eyga at hitta føroyskar veitarar, ið Statoil kann samstarva við, tá ið farið verður undir oljuleitan aftur í føroyskum øki.

Afturat Statoil koma eisini fleiri aðrar norskar fyritøkur úr serliga Stavanger-økinum. Talan er fyrst og fremst um fyritøkur, ið Statoil frammanundan hevur samstarv við, og sum eru veitarar hjá norska oljurisanum.

Millum hinar útlendsku luttakararnar á stevnuni teljast fleiri íslendsk reiðarí, og úr Danmark koma fleiri ídnaðar- og tænastufyritøkur, sum fyrst og fremst virka innan fiskivinnuna.

## Áhugaverdir fyrilestrar

Umframt sjálva framsýningina í høllini í Runavík, har stevnuluttakararnir fara at hava básar, har teir sýna fram nakað av tí, sum teir hava at bjóða, verður eisini skipað fyri eini fyrilestrarøð.

Fyrilestrarnir verða hildnir í Kelduni í Skálabotni, og evnini, ið verða viðgjørd, eru áhugaverd.

Millum teirra ein fyrilestur, har umboð fyri Dansk Industri fara at tosa um leiðsluavbjóðingarnar í altjóða handli. Somuleiðis fara umboð fyri Kaupthing Bank Ísland at greiða frá, hvussu uppkeyp kann nýtast sum ein háttur hjá eini fyritøku at koma uttanlands og vaksa.

Fyrilestrarnir eru eisini fyri almenninginum, og teir verða mettir at verða sera viðkomandi og forvitnisligir fyri øll, ið hava áhuga fyri útflutningsvinnu og altjóða vinnuviðurskifti. Til ber at síggja eitt nærri yvirlit yvir skránna fyri stevnuna á heimasíðuni hjá Faroexpo 2005, sum eitur www.faroexpo.fo, og har ber eisini til at ogna sær atgongumerkir til fyrilestrarnar.